# Dómarayvirlit

**Formuladeildini 21/10:**

| | |
|---|---|
| NSÍ – VB/Sumba | Ransin Djurhuus |
| HB – KÍ | Páll Augustinussen |
| EB/Streymur – B36 | Petur Reinert |
| AB – B71 | Dagfinn Olsen |
| GÍ – Skála | Rúni Gaardbo |

!. deild 20/10:

| | |
|---|---|
| B68 – KÍ | Bárður Mortensen |
| ÍF – B36 | Jan Skoradal |
| LÍF – FSV 04 | Høgni Hansen |
| TB – HB | Páll Augustinussen |

# Silvurmerkini standa upp á spæl

**Í Sundalagnum eru møguleikarnir fyri endurtøku av næstfremsta plássinum betri, enn teir leingi hava sæð út til at vera**

EB/STREYMUR-B36

*Jákup Mørk*

Í fjør vann EB/Streymur silvurkrónurnar í landskappinginI. Tað var eitt ógvuliga stórt vónbrot, tí síðani summarsteðgin og út á heystið var samansetta liðið besta boðið upp á gullkrónurnar. Í síðsta umfarinum kiksaði tað so rudduliga, og vónbrotið var sjálvandi stórt.

Nú er EB/Streymur á triðja plássi. Um tað eydnast at vinna silvurmerkini, verður talan um betri endastøðu, enn tað leingi hevur sæð út, at tað skuldi gerast. Um tað eydnast, verður talan um krúnan á fínum kappingarári. EB/Streymur vann fyrr í summar steypafinaluna, og silvurmerkini í landskappingini høvdu verið vorðin sum farvæl gáva til venjaraparið, Piotr Krakowski og Sámal Erik Hentze, sum hava fingið so væl burturúr í Sundalagnum.

Møguleikin liggur í, at heimaliðið megnar at vinna á størsta kappingarneytanum til silvurmerkini, tá ið B36 sunnudagin fer at vitja.

Um tað eydnast EB/Streymi at vinna á B36, og um B36 ikki í síðsta umfarinum fær fult ímóti HB, so fer EB/Streymur, sum í síðsta umfari skal spæla á Sandi, at hava silvur møguleika.

Hjá EB/Streymi kemur tað heilt væl við, at Arnbjørn T. Hansen, sum seinastu árini hevur verið sera grammur frammanfyri mótstøðumálini, nú tykist vera komin rættuliga fyri seg eftir beinbrotið fyrr í ár.

Saman við Leif Niclasen hevur Arnbjørn T. Hansen verið upptikin á U21 landsliðnm.

Í B36 hevur lagið onkuntíð verið betri, enn tað er nú fram ímóti kappingarenda. Burtur úr trimum teimum seinastu uppgerðunum hevur B36 fingið fýra stig – 1-1 á heimavølli ímóti Skála, 4-1 á heimavølli ímóti AB og 0-1 á Sandi.

Tað er í hesum tíðarskeiðnum, at B36 hevur mist møguleikan fyri at vinna FM heitið, sum teir leingi vóru favorittar at vinna. Laka gongdin seinastu vikurnar hevur borið við sær, at nú er møguleiki fyri, at silvurkrónurnar eisini kunnu gleppa árstalsfelagnum av hondum.

Kurt Mørkøre hevur restað fleiri spælarar í venjingunum seinastu vikurnar. Jákup Mikkelsen, Bergur Midjord, Mikkjal Thomassen og Hanus Thorleifsson hava verið á landsliðsferð. Mikkjal er so mikið skaddur, at tað er rættuliga ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla sunnudagin. Jóhan V. Gunnarsson hevur verið á U21 landsliðnum.

EB/Streyma málverjin, René Tórgarð, hevur eisini verið á landsliðsferð, og sostatt hevur hann vant saman við B36 málverjanum Jákupi Mikkelsen.

Tá ið liðini hava dystast fyrr í summar, hevur B36 báðu ferðirnar verið omaná. Í báðum førum vann B36 1-0.

# Søgulig

**Men almenna hátíðarhaldið í sambandi við fyrsta FM heitið nakrantíð hjá NSÍ verður ikki fyrrenn um eina viku**

NSÍ-VB/SUMBA

*Jákup Mørk*

Sunnudagin upprennur dagurin, sum tey í NSÍ hava bíðað eftir síðani besta fótbóltsliðið hjá teimum fyri fyrstu ferð royndi seg í fremstu røð. Tað var í 1976!

Eingin ivast í, at NSÍ fer at fáa stig og vinna, tá ið VB/Sumba fer at vitja í Runavík sunnudagin. Tað kann eisini væl fara at vísa seg, at NSÍ verður meistari, um tað óhugsandi skuldi

# Við – ikki við

**AB**
**Leikbann: Allan Mørkøre**
**Við aftur: Dion Jacobsen og Fróði Clementsen**
**Burturstaddir: Jónas Tór Næs og Magnus Poulsen**
**Ivasamur: Evrard Blé**

**B36**
**Ivasamur: Mikkjal Thomasen**

**B71**
**Skaddir: Clayton Soares (fiburspreinging)**
**Eirikur Poulsen (brotið beinið)**

**EB/Streymur**
**Skaddur: Gert Hansen (knæskaði)**

**GÍ**
**Skaddur Sámal Joensen (knæskaði)**
**Leikbann: Áslakkur R. Petersen**

# Klassikarin í skuggan

**2007 kappingarárið tykist eitt nú fara at verða eyðkent av, at hvørki av mest vinnandi feløgunum fer at fáa heiðursmerkir**

HB-KÍ

*Jákup Mørk*



Sunnudagin fær HB vitjan av KÍ. Klassikarin hevur ofta verið meiri áhugaverdur, enn støðutalvan hesa ferð boðar frá, at hann er.

HB og KÍ hava tilsaman vunnið meiri enn helmingin av øllum FM heitunum, og tað er ikki so ofta komið fyri, at hvørki av hesum feløgunum hevur vunnið okkurt slag av heiðursmerkjum.

Soleiðis kann tað væl vera, at tað fer at vera hesa ferð. HB er á fjórða plássi, og KÍ eru á sætta plássi. Klaksvíkingar kunnu enda á 8. plássi, og teir kunnu vinna seg fram á 5. pláss. Avbjóðingarnar eru stórar. Umframt arvafiggindan í høvuðsstaðnum sunnudagin er nýggja meistaraliðið NSÍ í Klaksvík leygardagin um eina viku.

Áhugin fyri KÍ er framvegis ógvuliga stórur í Klaksvík og Norðoyggjum. Ferðalagið suður í Gundadal verður hesa ferð ikki so stórt, sum tað ofta hevur verið. Fótbóltstosið har norðuri snýr seg nú mest um, hvussu tað fer at eydnast at manna KÍ til komandi kappingarár.

Møguleikin hjá HB at vinna bronsumerkini er treytaður av, hvussu tað gongst hjá